# sjógvi



*Holið í hekkuni sær ógvusligt út á myndini. So ógvusligt var tað kortini ikki í veruleikanum: Teir hava tikið eitt petti úr, fyri at kunna seta eina nýggja plátu í ístaðin fyri*



*Undir landganginum verður arbeitt av allari megi. Men ein slík umvæling skal gerast ordiliga, og tað tekur sína tíð*



*Gongst sum ætlað skuldi Teistin fara í sigling aftur kl. 13:15*

ferjuleguna í Skopun, bar hann við ein av stólpunum. Hesin stólpin er við tann innara innsiglingarmunnan.

- Nógvur súður var í innsiglingini. Og hetta hevði við sær, at Teistin kom at liggja nakað tværur fyri.

- Tað var orsøkin til at hann bar við henda stólpan, sigur Niels Juel Arge, virkandi stjóri á Strandferðsluni.

Orsakað av hesum óhappinum fekk Teistin eina buglu og tvær rivur í stýriborðssíðu aftan.

## Ikki vandi

Menn av Sandoy fóru beinanvegin undir at umvæla skaðan, soleiðis at Teistin kundi sigla yvir um Skopunarfjørð á Gomlurætt.

Niels Juel Arge staðfestir tó fyri Sosialinum, at báðar rivurnar eru omanfyri vatngangin.

Sum skilst á fólki var ongatíð vandi á ferð. Hinvegin kundu ferðafólk, sum ætlaðu sær við, væl ynskt sær eina munandi betri kunning frá Strandferðsluni um óhappið og útlitini fyri siglingini annars.

Í morgun vóru teir frá skipasmiðjuni í ferð við at umvæla skaðan. Teir høvdu tikið eina plátu úr hekkuni, og vóru tá í ferð við at seta eina nýggja plátu í ístaðin.

Fyri tann ókøna sá holið út til at verða rættiliga stórt. Men teir kønu dugdu tó at siga frá, at neyðugt var at taka eitt so stórt petti burtur úr til umvælingina.

Alt slíkt tekur sína tíð. Hóast menninir valla góvu sær tíð til nakran steðg, máttu arbeiðið taka sína tíð og tí varð lýst við at siglingin fór at verða tikin upp aftur eftir middagsleitið í dag.

Á Sandoy vóru hinvegin nógv fólk sum ætlaðu sær norður um og onnur sum mundu ætla sær suður um Skopunarfjørð.

Tey verða øll noydd at bíða til seinnapartin í dag!

> ” *Tann seinasti bilurin verður standandi eina løtu aftrat. Um lítla løtu fer hann helst avstað aftur. Tað kann verða heldur langligt at bíða tríggjar tímar á einum slíkum oyðistaði*

## FAKTA

**Teistasjógvur:** Sjógvur inni við land, har ið teisti vanliga heldur til.
**Inni á teistasjógv:** Tætt undir landi.
**At liggja inni á teistasjógvi:** At royna fram við landi.
**Hasin liggur ikki á teistasjónum:** ***1:*** Er fúsur at fara longri leiðir, ***2:*** Er íðin
*(Kelda: Orðaskjáttan)a*